# Fara undir nýbygning á skipasmiðjuni í heyst

**Fugltúgvan verður longd, Venus verður nútímansgjørdur, og Jón Kjartansson fær nýggja bógskrúvu. Í november/ desember verður farið undir nýbygning á Tórshavnar Skipasmiðju**

ÍDNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í seinastuni hevur væl av arbeiði verið á Tórshavnar Skipasmiðju.

Gunnar Mohr, stjóri, sigur, at einir 150-160 mans eru til arbeiðis í løtuni, og tað heldur hann vera á góðari leið.

Hann vísir á, at umframt leingjanina av Fugltúgvuni, verður arbeitt umborð á línubátinum, Ekliptiku, sum nú kallast Venus. Øll línuskipanin verður skift, arbeiðsdekkið verður skift, og aðrar broytingar eru gjørdar umborð á skipinum, sum nú hevur fingið nýggjar eigarar og er heimahoyrandi í Sandavági.

Í gjár kom íslendski nótabáturin, Jón Kjartanson, fyrrverandi Hólmaborg, upp á bedingina hjá Tórshavnar Skipasmiðju.

– Vit fara at seta nýggja bógskrúvu í skipið. Saman við árligum viðlíkahaldi, sum skipið eisini skal hava, fer hetta arbeiði at taka einar tríggjar vikur, sigur hann.



*Um mánaðarskiftið november/ desember verður farið undir enn ein nýbygning á Tórshavnar Skipasmiðju. Hetta er ein trolbátur – av sama slagi, sum Hansa Maria og Skálafossur*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Nýbygging

Gunnar Mohr sigur, at um mánaðarskiftið november/ desember verður farið undir at byggja nýggjan trolbát til Bjarna Kass í Havn.

Hesin báturin, sum verður av sama slagi sum trolbátarnir, Hansa Maria og Skálafossur, kemur í flotan fyri gamla Fiskaklett.

– Nýggi trolbáturin verður somu longd, sum Hansa Maria og Skálafossur hava í dag – eftir, at teir eru vorðnir longdir á Skála Skipasmiðju.

Gunnar Mohr sigur, at trolbáturin hjá Bjarna Kass verður liðugur flaggdagin, 25. apríl komandi ár, og kostnaðurin verður 12 mió krónur.

### 12-14 póllendingar

Umframt føroyingarnir, sum starvast á Tórshavnar Skipasmiðju, arbeiða einir 12-14 póllendingar eisini hjá skipasmiðjuni í løtuni.

Gunnar Mohr sigur, at póllendingarnir eru sveisarar og skipsbyggjarar.

– Summir av póllendingunum hava verið í starvi hjá okkum í meira enn 15 ár, og vit eru væl nøgdir við menninar, sigur stjórin á Tórshavnar Skipasmiðju.

---



*Myndin er av fyrrverandi føroyska ísfiskatrolaranum, Mars, sum landar kokain í Las Palmas*

## Mars lossar kokain í Las Palmas

ÓLÓGLIG VEIÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í blaðnum í síðstu viku høvdu vit ein greinastubba um fyrrverandi føroyska ísfiskatrolaran, Mars, sum varð seldur úr Sandavági til Hósvíkar og síðan av landinum til hummaraveiði.

Vit skrivaðu, at skipið seinni varð tikið av sponsku myndugleikunum við 11 ballum av marihuana í lastini, sum høvdu eitt søluvirði av nøkrum miljardum krónum.

Tað var onkur lesari, sum hevði sæð myndir av skipinum í donsku TV-ávísini, har tað lá í Las Palmas á Grand Kanariu og lossaði henda dýra – og ólógliga – »fong«.

Skipið bar framvegis navnið Mars, eins og gamli heimstaðurin og kennibókstavirnir stóðu á brúnni ella skipssíðuni.

Nú skipið er so langt av landi skotið, er torført at siga, hvørji tíðindi eru røtt – og hvørji ikki eru tað. Haraftrat kemur, at hendingin fór fram tíðliga í hesum árinum.

Eftir at vit høvdu prentað greinastubban, fingu vit sendandi eina leinkju til eitt stórt blað í Las Palmas, har vit funnu hesa mynd av fyrrverandi føroyska ísfiskatrolaranum.

Sum skilst í greinini, var manningin umborð á Mars russisk/ ukrainsk, tá ið skipið varð tikið, og lastin var ikki marihuana, men kokain.

Í greinini stendur, at Mars hevur 2.500 kilo – ella 5.000 pund – av kokaini, sum myndugleikarnir hava lagt hald á.

Skipið varð tikið einar 30 fjórðingar norður úr Tenerifa, sum er ein av kanarisku oyggjunum.

---

Fróðskaparsetrið:

## Økir um førleikan í alivinnuni

SKEIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Náttúruvísindadeildin á Fróðskaparsetrinum hevur sent alivinnuni innbjóðing um at luttaka í skeiði um aling, sum verður á Náttúruvísindadeildini í heyst. Skeiðið, sum er partur av lívfrøðisútbúgvingini á Setrinum, gevur eina grundleggjandi vitan um aling og tær fyritreytir, ið skulu vera til steðar fyri at fáa sum mest burtur úr hesi vinnu.

Evnini, sum verða gjøgnumgingin, eru grundleggjandi um alifisk og umhvørvi, smoltframleiðslu og framleiðslu av vaksnum fiski, kynbótararbeiði, sjúka og at enda um hvørja ávirkan streymviðurskifti hava á alingina.

Skeiðið verður skipað sum 2x20 fyrilestrartímar yvir tvær vikur. Hørður Wardum fer at taka sær av partinum um aling av laksi og toski og um kynbótararbeiði. Jóhanna Olsen frá umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni tekur sær av umhvørvispartinum, og Peter Østergaard, fiskadjóralækni á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni fer at undirvísa um fiskasjúkur. Peter fer eisini saman við Knud Simonsen frá Náttúruvísindadeildini at greiða frá um spjaðingina av fiskasjúkum. Seinasta evnið á skránni verður um alingútgerð í Føroyum. Hesum partinum fara Knud Simonsen og Øystein Patursson at taka sær av.

---

# Kalvafiskiskapur í opnum báti

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er deiligt og avslappandi at vera á báti, serliga tá ið veðrið er gott. Hetta er heilsubót til likams og sálar. Er fiskur at fáa, ger tað ikki løtuna verri.

Alfred Eliasen og Andre Johannesen úr Leirvík hava verið onkran kalvatúrin saman í føroyskt bygda bátinum, Beintu.

At seta nakrar kalvalínur av og á er spennandi ítrív hjá monnum.

Hendan dagin vignaðist væl. Seks kalvar var fongurin á línuni, teir settu.



*Leirvíkingar gera ein kalvatúr av og á – og onkuntíð »bítur« á, sum hendan dagin, tá ið teir fingu seks kalvar*